# Viðmerkingar til tíðindaskriv frá Tórshavnar Býráð um soppavøkstur í Kommunuskúlanum

**PÁLL POULSEN**
lærari og trygdarumboð



Ætlanin hjá mær við hesum skrivi, er ikki at fara í eitt alment kjak við býráðsformannin og leiðarin av teknisku deild í Tórhavnar Kommunu, men eg kenni meg noyddan at taka til orðanna móti tíðindaskrivi, ið Tórhavnar Kommuna hevur sent til fjølmiðlarnar.

Í tíðindaskrivinum eru nakrir skeivleikar, og vil eg umrøða teir her:

Lat meg taka seinasta reglubrotið fyrst. Har verða trygdarumboð(undirritaði) og skúlaleiðsla ákærd fyri at hava ført fram, at talan er um álvarsligan heilsuvanda og á tann hátt loypt ræðslu á næmingar, foreldur og starvsfólk uttan at hava nakran fakligan førleika at meta um heilsuvandan.

Til hetta vil eg eg siga:

Tað er rætt, at vit ikki hava fakligan førleika til at meta um heilsuvandan á skúlanum, men vit hava álit á, at arbeiðsmedisinarin á Arbeiðseftirlitinum hevur nóg góðan fakligan førleika, og tí vísa vit eisini til hansara í okkara útsøgnum.

Í lógini um arbeiðaravernd stendur m.a. soleiðis:

Trygdarnevndin skal fyriskipa, leiða, ráðgeva, kunna og hava eftirlit við tí trygdar- og heilsuliga arbeiðinum á virkinum.

Arbeiðsplássið skal vera soleiðis innrættað, at tað lýkur øll trygdar- og heilsulig krøv.

Viðurkendar normar og fyrisett mát, ið hava trygdar- ella heilsuligan týdning, skulu fylgjast.

Sum trygdarumboð fyri starvsfólkið í Tórshavnar Kommunuskúla havi eg skyldu at kunna um viðurskifti, sum kunnu vera heilsuskaðilig. Tað kann væl vera, at býráðið ikki hevur eina juridiska skyldu at kunna tey, ið dagliga eru inni í Kommunu-skúlanum, men tað finst eisini nakað, ið vit kalla ein moralsk skylda, so í hesum sambandinum er tað veruliga bert ein spurningur um, hvørjum støði moralurin er á.

Í tíðindaskrivinum verður ført fram, at blámusoppur ikki er akutt skaðiligur og yvirhøvur verður tann møguligi heilsuvandin av soppavøkstri tónaður sera langt niður. Eg eri ótrúliga imponeraður av hesum útsøgnum hjá býráðnum, eg visti ikki av, at býráðið hevði ein soppaserfrøðing í starvi, hvørs fakligi kunnleiki lá langt oman fyri vitanina hjá øllum øðrum serfrøðingum.

Eg gjørdi mær tann ómak at fara á alnótina at leita eftir tilfari um blámusopp, og tað var ikki smávegis eg fann, allastaðni verður blámusoppavøkstur í bygningum mettur sum ein heilsuvandi.

Kanningin sum Teknologisk Institut hevur gjørt fyri Tórshavnar Býráð var framd
3. august 2007, t.v.s., at skúlin hevði staðið tómur í ein góðan mánað og haraftrat hevði tað eisini verið lutfalsliga turt í nakrar vikur. Um hesi viðurskifti hava nakran týdning fyri kanningarúrslitið eri eg ikki førur fyri at siga við vissu, men eg rokni við, at hetta hevur eina ávísa ávirkan.

Eitt annað, sum eg undrist á er, at býráðið ger eina tílíka kanning, tá úrslitið av henni ongan týdning hevur. Tað er at søpla burtur pengarnar hjá skattaborgarunum í Tórshavnar Kommunu.

Hvør er so veruleikin?

Veruleikin er, at kanningin er bert gjørd á 20 ávísum støðum í skúlanum. Á tveimum støðum í gongini er soppavøksturin væl oman fyri markvirði, í sangstovuni og í einari floksstovu er soppavøksturin oman fyri markvirði. Teknologisk Institut mælir eisini til, at kanningin verður víðkað til at umfata allan bygningin. Vert er at leggja sær í geyma, at tað ikki er soppurin sum so, ið er helsuskaðiligur, men sporarnir, sum eru so lættir, at teir sveima í luftini. Hesir sporar kunnu sambært upplýsingum okkara gera skaða á andingarleiðina hjá fólki, og serliga eru tað tey, ið framman undan hava trupulleikar við andingarleiðini t.d. tey, ið hava astma, astma/bronkitis og cystiska fibrosu. Við hesum í huga sigur tað seg sjálvt, at tað er als ikki uttan vanda at ganga har, ið blámusoppur er staðfestur. Í gongini í Kommunuskúlanum ganga fólk líka frá kl. 8 á morgni til kl. 10 – 11 á kvøldi.

Lívstreytirnar hjá soppavøkstri eru hesar: Har skal vera vætukent, har skal vera lívrunnið tilfar og luftskiftið skal vera vánaligt. Allar hesar treytir eru til staðar fleiri staðni í Kommunuskúlanum.

Flestu vindeygu eru so rotin, at væta seyrar inn gjøgnum, tá ættin stendur á. Væta setir eisini inn gjøgnum klædningin, sum ikki er serliga gamal. Bjálvingin á útveggunum er sera vánalig. Í hvørjari stovu eru 22 – 25 næmingar. Luftskifti er sera vánaligt. Innast á útvegginum er træbetong, sum inniheldur lívrunnið evni. Alt hetta ger at vakstrar-umstøðurnar hjá soppum eru næstan optimalar. Haraftrat eru onnur brek, sum skyldast vánaligt viðlíkahald, t.d. lekur takið í eyri og seyri.

Tá eg lesi tilráðingina í rapportini frá Teknologiskt Institut, er ongin ivi. Citat: Er årsagen til skimmelvæksten alene mangefuldt vedligehold, må der straks rettes op på dette.

Saman við frágreiðingini er eisini ein tilráðing til handverkarar, tá teir arbeiða á støðum við blámusoppi. Henda tilráðing vísir greitt, hvussu álvarsliga Teknologiskt Institut metir vandan.

Niðurstøðan hjá mær er framvegis: At Tórshavnar Býráð skuldi kunnað øll, sum hava nakað við skúlan at gera um kanningarúrslitið, ístaðin fyri at gera hetta til eitt klandursmál, og harvið skyldar býráðsfomaðurin og leiðarin fyri teknisku deild okkum eina umbering fyri orðingina í seinasu reglubroti í tíðindaskrivi teirra.

Vónandi hevur Tórshavnar Býráð funnið nøktandi loysnir upp á teir akuttu trupulleikarnar. Lat ongan iva verða um, at øll, ið nýta hølini í Kommunuskúlanum fegin vilja samstarva um skilagóðar loysnir.

# Ein áheitan til ALLAR politisku flokkarnar og valevnini

**FRÍÐÁLVUR JENSEN**



**Summarfestivalurin fór í luftina - G! Festivalurin fór á heysin og Prixið fór í søguna**

Vit kunnu ikki hevja tann pástand, at føroyskt tónleika- og mentunarlív hevur tað serliga GOTT – ella?

Eg fari at senda eina inniliga áheitin til ØLL tey, sum lata seg stilla upp fyri ymsu flokkarnar – kring landið.

Endurtøkur eru, sum eg havi sagt áður, neyðugar, um ein veruliga vil hava hava eitt kjak ígongd, og tí fari eg at royna at seta eitt slíkt ígongd, til tess at gera enn eina roynd, at skapa okkara tónleikarum og føroysku listini betri karmar.

Tað skal, enn einaferð, staðfestast, at tað er alment kent úr øðrum londum, at verða karmarnir víðkaðir fyri mentanini, gevur hetta eina synergieffekt yvir á vinnuliga virksemið, so hvar er veruligi trupulleikin?

Eg kann bara koma við teirri niðurstøðu, at fer mentanin og listin fyri bakka í okkara samfelag, fer hetta at taka nógv við sær í fallinum, og so mugu tit mongu valevnini taka støðu til, um vit kunnu liva við hesum?

At umstøðurnar hjá festivalunum og Prix´inum er ein ímynd fyri tí hóttafalli okkara tónleikalív er fyri, í løtuni, skal eg ikki taka støðu til, men fær føroyska mentanin ikki størri rúmd í politisku skipanini, kemur hetta at skaða okkara samleika, og fara nógv av okkara listafólkum at missa seg sjálvi, tí fíggjarligu- og fysisku umstøðurnar fara at spenna bein fyri mong av teimum.

Eg ynski sjálvandi, at bæði Summarfestivalurin og G! Festivalurin koma sær úr truplu støðuni.

Tað er ongin loyna, at byrja vit at tosa um mentan og tónleik, eru tað fleiri, sum yppa øksl og síggja hetta sum ein luksustrupulleika – tað er tað IKKI!

Mong hava sett hesum fólkum spurningin, nær hesi ætla sær at finna sær eitt veruligt arbeiði.

Hetta sigur nakað um, hvussu stutt vit eru komin á leiðini, og tí er neyðugt við eini munadyggari hugburðsbroyting, so vit ØLL byrja at síggja mentanina og listina at vera ein tíðandi part í okkara gerandisdegi.

**Gevið mentanini tað – henni tørvar!**

Eg vil bara, enn einaferð, senda eina áheitan til politiska myndugleikan um, at skapa tónleikinum og listini so góðar møguleikar, sum gjørligt, so hesi kunnu geva okkum og øllum føroyska samfelganum nakað gott og burðardygt á leiðini.

GOTT VAL ØLL SOMUL!

# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

**RICHARD DANIELSEN**



**Sætti partur**

1. sámuelsbók byrjar við at ein kvinna, Hanna, biður Gud geva sær ein son, so skal hon geva Gudi hann aftur. Hanna varð bønhoyrd, fekk sonin Sámuel, og gav Harranum hann aftur, sum hon hevði lovað. Sámuel vaks tí upp í tabernaklinum hjá Eli presti, og tíðliga byrjaði Harrin at tala til hendan unga dreingin.

1 So gjørdi nú drongurin Sámuel tænastu fyri HARRANUM undir Eli. Orð HARRANS var sjáldsamt á teimum døgum - sjónir vóru fáar.

2 So var tað ein dagin, meðan Eli lá og svav, har sum hann var vanur at liggja - eygu hansara vóru nú so farin, at hann sá einki;

3 og lampa Guds var enn ikki sløknað; Sámuel lá og svav í halgidómi HARRANS, har sum ørk Guds stóð -

4 tá rópti HARRIN á Sámuel, og hann svaraði: "Ja, her eri eg!"

5 Hann skundaði sær so til Eli og segði: "Her eri eg - tú rópti meg!" Men hann svaraði: "Eg havi ikki rópt teg - far bert aftur og legg teg!" - So fór hann og legði seg.

6 Tá rópti HARRIN uppaftur: "Sámuel!" Og Sámuel fór upp og til Eli og segði: "Her eri eg - tú rópti meg!" Men hann svaraði: "Eg havi ikki rópt teg, sonur mín - far bert aftur og legg teg!"

7 - Sámuel hevði enn ikki lært HARRAN at kenna, og orð HARRANS var enn ikki opinberað honum. -

8 Tá rópti HARRIN triðju ferð: "Sámuel!" Og hann fór upp og til Eli og segði: "Her eri eg - tú rópti meg!" Tá skilti Eli, at tað var HARRIN, ið rópti á drongin.

9 Eli segði nú við Sámuel: "Far aftur og legg teg, og rópar Hann á teg, so sig: "Tala, HARRI - tænari Tín hoyrir!"" So fór Sámuel og legði seg, har sum hann átti at liggja.

10 Tá kom HARRIN og stóð har og rópti - nú sum áður -: "Sámuel, Sámuel!" Og Sámuel svaraði: "Tala - tænari Tín hoyrir!"

11 So segði HARRIN við Sámuel: "Nú skal Eg gera nakað í Ísrael, sum skal fáa tað at ringja fyri báðum oyrum alra teirra , ið hoyra um tað!
1.sámuelsbók 3,1-11.

Her síggja vit, at Harrin talar til ein ungan mann, kanska smádrong. Hesin drongurin gjørdist tann stóri gudsmaðurin Sámuel profetur og dómari í Ísrael.

Søgan, sum vit lesa um í 1. sámuelsbók, er, sum alla aðrastaðni í bíbliuni, prógvað av hendingum, sum vísa, at Harrin stóð aftanfyri sítt verk og prógvaði, hvør hann var. Her lesa vit m.a. hendingina um, tá ið filistarar tóku sáttmálaørk Guds og fóru til filistaraland við henni og settu hana inn í tempul Dagons. Men hvat hendi. Jú tveir morgnar upp í slag lá Dagon fram eftir rommum á gólvinum frammanfyri ørk Guds. Høvdið og báðar hendurnar lógu á gáttini tann seinra dagin. Harrin slerdi eisini filistarar við sjúku, soleiðis at teir máttu senda ørkina aftur til ísraelsmenn. Tað var gjørt á tann hátt, at tvær kýr, ið nýliga høvdu kálvað, vóru spentar fyri ein vagn, kálvarnir vóru læstir inni í fjósinum. Men kýrnar hildu av stað við ørkini og steðgaðu ikki, fyrenn tær vóru komnar um markið til Ísrael og steðgaðu í Bet-Semes.

Jú sanniliga, bíblian er ein bók full av undrunarverdum hendingum, sum prógva Guds allmektiu hond. Gud kann lætt seta náttúrulógir úr gildi. Skuldi hann ikki kunna gjørt tað, hann sum sjálvur er arkitekturin og byggimeistarin aftanfyri alt, sum vit síggja og ikki síggja.

Bíblian er ísraelssøga og Guds tala til okkara, sagt frá av jødunum eftir boði frá Harranum yvir allari jørðini.

Hann hevur kunngjørt Jákupi orð Sítt, Ísrael boð Síni og lógir Sínar;
tað hevur Hann ikki gjørt við nakra aðra tjóð; lógir Hansara kenna tær ikki. - Halleluja! Sálm. 147,19-20.

Framhald.